| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>30. januar 2025 | Blað nr.: 74<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 30. januar 2025 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 34/25 – 45/25**

**FUNDARLEIÐARI:**
Elsa Berg

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk
Anja Weyhe
Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen
Guttormur í Skála
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Høgni Vilhelmsen
Birgir Nielsen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Justinussen
Eyðfríð Jacobsen
Hermann Mortensen
Mortan Simonsen
David Andresen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam
Olga Knudsen

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 34/25 | 25/00163-1 | Mál beind í nevndir 2025 | 76 |
| 35/25 | 25/00196-1 | Val av 5 limum í musikkskúlanevndina | 77 |
| 36/25 | 25/01632-1 | Uppskot til broyting av kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu | 78 |
| 37/25 | 25/01716-1 | Uttanumøki við dagstovnarnar | 81 |
| 38/25 | 25/01714-1 | Betra akustiskta inniumhvørvið (ljóðviðurskifti) á dagstovnunum | 84 |
| 39/25 | 25/02002-1 | Foreldragjald á dagstovnaøkinum | 87 |
| 40/25 | 25/01898-1 | Undirskriftsreglur í sambandi við skjøl, ið binda kommununa | 90 |
| 41/25 | 25/01097-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Nólsoy | 92 |
| 42/25 | 25/01099-1 | Skeltisreglugerð | 95 |
| 43/25 | 25/01683-1 | Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum | 98 |
| 44/25 | 25/00292-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2024 - 24/00061 | 101 |
| 45/25 | 25/02303-1 | Skeið í Íslandi februar 2025 fyri býráðslimum valskeiðið 2025-2029 | 103 |

**Til viðgerðar**

## 34/25 Mál beind í nevndir 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 34/25 | 25/00163-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Tikið til eftirtektar.

# 35/25 Val av 5 limum í musikkskúlanevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 09.01.2025 | 24/25 | 25/00196-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 35/25 | 25/00196-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. reglugerð frá 30. september 2009 um Tórshavnar Musikkskúla, velur býráðið fimm nevndarlimir í eina musikkskúlanevnd, ið hevur til endamáls at fremja áhugamál skúlans. Eisini arbeiðir nevndin fyri góðum korum hjá musikkskúlanum, miðar eftir at vekja ans fyri tónleiki og arbeiðir sum heild fyri áhugamálum musikkskúlans. Nevndin eigur saman við musikkskúlanum at eggja til eitt ríkt og fjøltáttað tónleikalív.

Í nevndini sita: Halla Samuelsen, Sára Gullfoss, Petur Frank Holm, Jákup Petur Eliasen, Malan Eyðunsdóttir.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir.

**Býráðsfundur 09. januar 2025:** Samtykt at velja Maluna Eyðunsdóttir, Johnhard Eliasen, John av Reyni, Hans Petur í Brekkunum og Leiv Simonsen.

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Samtykt at velja Hergeir Stakksberg í Musikkskúlanevndina fyri Hans Petur í Brekkunum.

# 36/25 Uppskot til broyting av kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 09.01.2025 | 33/25 | 25/01632-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 36/25 | 25/01632-1 |

**Upprunin til málið**
Ætlan hjá býráðsmeirilutanum at umskipa vinnunevndina til fasta nevnd.

**Lýsing av málinum**
Vinnunevndin er í dag undirnevnd hjá fíggjarnevndini, og í sambandi við, at nýtt býráð hevur tikið við 1. januar 2025 hevur býráðsmeirilutin ynski um at broyta vinnunevndina, so nevndin gerst føst nevnd á jøvnum føti við hinar føstu nevndirnar undir býráðnum.

Í dag eru sjey fastar nevndir undir býráðnum umframt fíggjarnevndina. Hesar eru:

1) Tekniska nevnd
2) Byggi- og býarskipanarnevnd
3) Náttúru- og umhvørvisnevnd
4) Trivnaðarnevnd
5) Heilsu- og eldranevnd
6) Mentamálanevnd
7) Havnanevnd

Við at gera vinnunevndina til fasta nevnd, verður talið á føstum nevndum átta.

Vinnunevndin kemur at umsita hesi málsøki:

1. Vinnuvirksemi og vinnubygningar, tó ikki á havnaøkinum
2. Vinnupolitikkur og vinnumál
3. Ferðavinna/cruisevinna
4. Handils- og tænastuvinnu
5. Vinnunýskipan
6. Vinnustrategi
7. Hýruvognsloyvi
8. Hugskotið
9. Stuðulsjáttanir á ferðavinnuøkinum

Nevndin verður á sama hátt sum hinar føstu nevndirnar mannað við fimm limum.

Av tí at ein føst nevnd kemur afturat teimum sjey, ið eru frammanundan, mugu ásetingarnar um samsýning til nevndarforfólk broytast. Samlaða samsýningin til nevndarforfólk kann í mesta lagi vera helvtina av samsýningini til borgarstjóran, og sostatt minkar samsýningin til nevndarforfólk úr 7,14% av borgarstjóralønini niður í 6,25% av borgarstjóralønini.

Broytingin fer at hava við sær eina ávísa hækking í samsýningini til býráðslimir, tí eftir broytingina skulu limirnir í vinnunevndini samsýnast við fastari samsýning á jøvnum føti við nevndarlimirnar í hinum nevndunum og ikki við fundarpeningi fyri hvønn fund sær, sum teir verða samsýntir við í dag.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin)
Kunngerð nr. 93 frá 9. september 2014 um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini.
Kommunustýrisskipanin fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu verður § 31 broytt og flutt, so ásetingarnar fyri vinnunevndina verða at finna saman við ásetingunum um hinar føstu nevndirnar.

Í kommunustýrisskipanini verður § 41, ið snýr seg um samsýningar, broytt samsvarandi ætlanunum um at umskipa vinnunevndina til fasta nevnd.

Broytingarnar í §§ 31 og 41 síggjast í skjali 25/01632-2.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | X | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 1110 | | | 1110 | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir til at taka undir við uppskotinum til broytta kommunustýrisskipan við teirri avleiðing, at vinnunevndin verður føst nevnd undir býráðnum.

**Býráðsfundur 09. januar 2025:** Samtykt við fyrstu viðgerð við 11 atkvøðum fyri og tveimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Maria Hammer Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

**Ískoyti:**
Borgarstjórin setir fram uppskot um at broyta starvsheiti í kommunustýrisskipanini soleiðis, at starvsheitið nevndarformaður verður broytt til nevndarforfólk, tó so, at almenna starvsheitið kann vera nevndarforkvinna og nevndarformaður.

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein settu fram broytingaruppskot um at starvsheitini í øllum førum eru nevndarformaður/nevndarforkvinna.

Atkvøtt varð fyrst um uppskotið til broyting av kommunustýrisskipanini sum samtykt við fyrstu viðgerð 9. januar 2025, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Annita á Fríðriksmørk, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Bergur Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen.

Síðani varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá umboðunum hjá minnilutan, ið fall við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Annita á Fríðriksmørk, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Bergur Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá borgarstjóranum, sum varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Annita á Fríðriksmørk, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Bergur Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

# 37/25 Uttanumøki við dagstovnarnar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.01.2025 | 5/25 | 25/01716-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.01.2025 | 4/25 | 25/01716-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 37/25 | 25/01716-1 |

**Upprunin til málið**
Dagføringar av uttanumøki við dagstovnarnar

**Lýsing av málinum**
Býráðið hevur játtað 4 mió. kr. til "Dagstovnar, uttanumøki"

Í fjør vár samtykti mentamentanevndin, at umsitingin fekk heimild til at arbeiða við at lýsa karmarnar um námsfrøðiliga virksemi. Her undir umstøðurnar til uttanumøki við dagstovnarnar. Fyri nærri lýsing sí mál nr. 24/01070.
Somuleiðis verður eftirlit framt við spæliplássum annaðhvørt ár, men eingin játtan er sett til at umvæla feilir og annað sum eftirlitið kemur fram á.

Nevnast kann eisini, at tá borgarstjórin í fjør vitjaði dagstovnar í kommununi var eitt afturvendandi ynski frá leiðara og starvsfólkum, at uttanumøkini vera hægri raðfest.

Ætlanin við játtanini er at gera smærri íløgur í uttanumøki við dagstovnarnar. Endamálið er at betra og nútímansgera uttanumøkini samráð við stovnarleiðarar.

Í tilgongdini í arbeiðnum at leggja fíggjarætlanina 2025 hevur politiska skipanin kunnað umsitingina um, at býráðið fór fyri fyrstu ferð at oyramerkja eina upphædd til smærri íløgur í uttanumøkir á dagstovnaøkinum. Av hesi orsøk hevur umsitingin ikki biðið um játtanir til tríggjar ítøkiligar verkætlanir.

Tí hevur umsitingin gjørt eitt tilmæli um eina raðfestingarætlan fyri, hvussu játtanin fyri 2025 eigur at vera brúkt:

| Verkætlan | J.nr. og løgukonto | Kostnaðarmeting |
|---|---|---|
| Løkjatún - heildarumvæla garðin | 24/07332, n/a | 1,8 mió. kr |
| Miðstovnurin - næsta byggistig: uttanumøki við vøggustovuna í gamla Realskúlanum | 23/01292, L31012 | 1,6 mió. kr. |
| Spælitorn – dagstovnurin H.A. Djurhuus | 24/02496, L31018 | 0,6 mió. kr. |

**Ætlan fyri hvussu játtanin verður umsitin framyvir**
Annaðhvørt ár verður eitt uttanhýsis eftirlit framt av spæliplássunum. Í eftirlitsfrágreiðingunum fær kommunan sera nógvar viðmerkingar.
Ein partur av játtanini kann framyvir, tvs. til fíggjarætlanina 2026 og frameftir, vera brúktur til at gera kostnaðarmiklar umvælingar, sum sýnsfólkið viðmerkir.
Játtanin kann eisini vera nýtt til at útvega nýggja spæliútgerð og at gera generellar betringar í garðinum t.d. skifta undirlendi osfr. í samráð við leiðaran.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- Mál nr. 24/01070 “Lýsing av karmunum um námsfrøðiliga virksemið í 2024”

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 3175 | LK31016 | Dagstovnar, uttanumøki | 3175 | | Heildarumvæla uttanumøki, dagstovnurin í Løkjatúni | Ja | 1,8 mió. kr. |
| 3175 | LK31016 | Dagstovnar, uttanumøki | 3175 | L31012 | Umbygging í Kongagøtu (Miðstovnurin) | | 1,6 mió kr. |
| 3175 | LK31016 | Dagstovnar, uttanumøki | 3175 | L31018 | Dagstovnurin Hans Andrias Djurhuus, útbygging | | 0,6 mió. kr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 4 mió. kr. |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | n/a |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | n/a |

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina og deildarleiðarin fyri Bygningsdeildina mæla nevndin til at samtykkja at játtanin á 4 mió kr. verður deild á hesar kontur fyri 2025:

- 1,8 mió. kr. av LK31016 "Dagstovnar, uttanumøki" til nýggja løgukonto "Heildarumvæla uttanumøki, dagstovnurin í Løkjatúni"
- 1,6 mió. kr. av LK31016 "Dagstovnar, uttanumøki" til L31012 "Umbygging í Kongagøtu (Miðstovnurin)"
- 0,6 mió. kr. av LK31016 "Dagstovnar, uttanumøki" til L31018 "Dagstovnurin Hans Andrias Djurhuus, útbygging"

- Og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. januar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2025:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið, við tí viðmerking, at tá tað í málslýsingini verður víst til mál 24/07332, Løkjatún – heildarumvæla garðin, so er rætta málið, ið víst skal verða til 24/02463.

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Einmælt samtykt.

# 38/25 Betra akustiskta inniumhvørvið (ljóðviðurskifti) á dagstovnunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.01.2025 | 6/25 | 25/01714-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.01.2025 | 3/25 | 25/01714-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 38/25 | 25/01714-1 |

**Upprunin til málið**
Ljóðviðurskiftini á dagstovnum

**Lýsing av málinum**
Býráðið hevur játtað 4 mió. kr. til LK31020 "Tillagingar á dagstovnaøkinum"

Í fjør vár samtykti mentamentanevndin, at umsitingin fekk heimild til at arbeiða við at lýsa karmarnar um námsfrøðiliga virksemi. Her undir inniumhvørvi á dagstovnunum, sum hevur sera stóran ávirkan á arbeiðsumhvørvi hjá starvsfólkum og børnum. Fyri nærri lýsing sí mál nr. 24/01070.

Í hesum sambandi kann nevnast, at tá borgarstjórin í fjør vitjaði dagstovnar í kommununi var eitt afturvendandi ynski frá leiðara og starvsfólkum, at betra ljóðviðurskiftini á stovnunum.
Leggjast kann afturat, at miðskeiðis í 2023 hevði trivnaðarstjórin og deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina ein fund við stovnsleiðararnar. Eitt ítøkiligt ynski frá stovnsleiðarunum var at betra um ljóðviðurskiftini á stovnunum.

Barna- og ungdómsdeildin hevur í 2024 umrøtt við Bygningsdeildina, hvussu ein tílík verkætlan viðvíðkjandi inniumhvørvinum kann setast í verk.
Semja er um, at skilabest er at gera kanningar av inniumhvørvinum á øllum stovnum. Kanningin fevnir um luftgóðsku, ljósviðurskifti og akustiskt inniumhvørvi.
Við at betra inniumhvørvi, metir umsitingin, at mest sannlíkt verður talið av sjúkradøgum færri. Harafturat kann tað hava við sær, at starvsfólk at hava størri orku til at arbeiða ein hægri brøk enn tey gera í dag.

Á dagstovnaøkinum eru yvir 40 bygningar og umleið 140 stovur/flokkar. Nógv teir flestu hava avbjóðingar við inniumhvørvinum. Ein serlig avbjóðing við flestu bygningum, er at akustiska inniumhvørvið als ikki eru nøktandi.

Tí mælir umsitingin til at gera ein støðulýsing av inniumhvørvinum í øllum bygningum á dagstovnaøkinum. Mett verður, at kanningarnar kunnu gerast í januar og februar mánað 2025.

Umsitingin mælir somuleiðis til, at játtanin í ár verður brúkt til at betra akustiska inniumhvørvi (ljóðviðurskifti) á dagstovnunum.

**Tilgongd**
Umsitingin mælir sostatt til, at fyrst kanna inniumhvørvi í stovum og felagshølum, har sum starvsfólk og børn í størstan mun halda til í bygningunum.

Fyri at játtanin skal koma so nógvum sum til ber til góðar er mest skynsamt, at ljóðviðurskiftini vera betraði í stovum og felagsrúmum har flestu børn og starvsfólk halda til.

Tá úrslit av kanningum fyriliggur gera Bygningsdeildin og Barna- og ungdómsdeildin eitt yvirlit yvir, hvørjir bygningar trongja til størstar ábøtur.

Játtanin røkkur neyvan til at umvæla ljóðviðurskifti á øllum bygningum. Tí mælir B&U at arbeiðið verður deilt javnt millum eindirnar B, A, R og N, so arbeiðið kemur flest møguligum starvsfólkum og børnum til góðar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Arbeiðsumhvørvislógin

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- Mál nr. 23/05278 "Verkætlan : Betra inniumhvørvi á dagstovnunum við serligum denti á ljóðviðurskiftini"
- Mál nr. 24/01070 "Lýsing av karmunum um námsfrøðiliga virksemið í 2024"

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| 3175 | LK31020 | Tillagingar á dagstovnaøkinum |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| 3175 | | | Ábøtur, ljóðviðurskifti |

| Upphædd |
|---|
| 3,5 mió. kr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 3,5 mió. kr. |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | n/a |

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina og deildarleiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til:

- at umsitingin fær heimild til at gera eina ætlan og seta í verk eina verkætlan til at betra ljóðviðurskiftini á dagstovnaøkinum
- at flyta 3,5 mió. kr. av LK31020 "Tillagingar á dagstovnaøkinum" til nýggja konto undir 3175 sum eitur "Ábøtur, ljóðviðurskifti" og,
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. januar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2025:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini, og at raðfestingarnar verða lagdar fyri aftur fíggjarnevndina sum kunning.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Einmælt samtykt.

# 39/25 Foreldragjald á dagstovnaøkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.01.2025 | 13/25 | 25/02002-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.01.2025 | 5/25 | 25/02002-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 39/25 | 25/02002-1 |

**Upprunin til málið**

Politisk raðfesting
Samgongan hevur sett sær fyri, at virka fyri so lágum fíggjartrýsti sum gjørligt og fer at seta átøk í verk, fyri at geva barnafamiljum størri fíggjarligt rásarúm.

**Lýsing av málinum**
Foreldragjaldið er 27% av rakstrinum.
Í samband við fíggjarætlanina fyri 2025 var hækkingin í rakstrinum á dagstovnaøkinum yvir 9%. Hetta førdi við sær, at gjøldini fyri ávikavist vøggustovu, barnagarð og frítíðarskúla hækkaðu samsvarandi.
Serliga er hækkingin á vøggustovuplássinum stór í kr.
Politiskt ynski er, at lækka gjaldið fyri vøggustovupláss.
Um foreldragjaldið fyri eitt vøggustovupláss fer úr 27% og niður í 25% so fer kostnaðurin úr 4019 kr. og niður í 3721 kr. um mánaðin. T.e. ein hækking á 79 kr í mun til gjaldið áðrenn hækkingina.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
At lækka gjaldið frá 27% og niður á 25% fyri eitt vøggustovupláss kostar áleið 1,8 mió.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

| **Býráðsfundur**<br>30. januar 2025 | Blað nr.: 88 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 3215 | | Aðrar útreiðslur barnaansing | | | | | 1,8 mió |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 1,8 mió |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á Børn og Ung mæla til at fluttar verða 1,8 mió kr. av 3215 Aðrar útreiðslur barnaansing til at lækka vøggustovugjaldið úr 27% og niður í 25% og

1,8 mió verður fluttar aftur á 3215 Aðrar útreiðslur barnaansing í árinum sum eykajáttan.
Somuleiðis mælir umsitingin til at politiska skipanin tekur støðu til dagstovnagjaldið í síni heild.

At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. januar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2025:** Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen løgdu fram broytingaruppskot um at lækka vøggustovugjaldið niður í 20% av útreiðslunum og barnagarðsgjaldið niður í 25% av útreiðslunum. Verður at fíggja av tøkum peningi.

Atkvøtt varð fyrst um tilmælið frá minnilutanum, ið fall við tveimum atkvøðum fyri og trimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá mentamálanevndini, ið varð einmælt samtykt.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen settu fram broytingaruppskot um at lækka vøggustovugjaldið niður í 20% av útreiðslunum og barnagarðsgjaldið niður í 25% av útreiðslunum. At fíggja av tøkum peningi.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, sum fall við fýra atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, sum varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari atkvøu  ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen.

# 40/25 Undirskriftsreglur í sambandi við skjøl, ið binda kommununa

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.01.2025 | 8/25 | 25/01898-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 40/25 | 25/01898-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Sambært § 44, 23, í lóg nr. 87 frá 17. Mai 2000 um kommunustýri-kommunustýrislógin-skulu skjøl í sambandi við keyp og sølu av fastari ogn o.t. verða undirskrivað av borgarstjóranum og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess.

Harumframt er ásett í § 6,1. Petti í Kommunustýrisskipani fyri Tórshavnar kommunu, at øll skjøl, ið binda kommununa, skulu undirskrivast av borgarstjóranum og einum persóni, sum býráðið hevur heimilað til tess.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Sí omanfyri.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at heimila Jóan Petur Hentze, kommunustjóra, at medundirskriva saman við borgarstjóranum, og verður eisini mælt til, at heimila Eyðnu Justinussen, miðfyrisitingarstjóra, at medundirskriva saman við borgarstjóranum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Einmælt samtykt.

# 41/25 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Nólsoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.01.2025 | 10/25 | 25/01097-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 41/25 | 25/01097-1 |

**Samanumtøka av málinum**
Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* varð samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar, síðani tær gjørdust partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á, hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar fyri bygdirnar torskildar, truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* eru yvirskipað viðurskifti viðgjørd við tí endamáli at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti, serstakan bygdadám og tílíkt.

Hetta málið er eitt framhald av málinum 22/03934, har byggisamtyktin fyri Nólsoy verður viðgjørd (sí viðheftu gomlu málslýsing, *Endurskoðan av byggisamtykt fyri Nólsoy).*

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum verður mælt til, at Nólsoy fær sína egnu almennu byggisamtykt.

Mett verður ikki, at byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava líka nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu hevur, av tí at talan er um minni bygdir, har ikki ber til at regulera virksemið eins neyvt sum í høvuðsstaðnum. Tí eru tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Nólsoy, eru hesi ymisku økini í bygdini:

A: Sethús
B: Vinnuendamál
C: Havnarøki
D: Almennir stovnar og mentan
E: Almenn frítíðarøki
F: Neyst og bátapláss
G: Friðað øki
H: Landbúnaður

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Nólsoy, sum sambært uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:

A: Bústaðarøki
B1: Havnarøki
B2: Vinnuøki
C: Miðstaðabygging
D1: Frílendi
D2: Almennir stovnar og mentan
E: Neyst

F: Frítíðarhús
G: Bóndahús
4. gr.: Landbúnaður

Tær ávísu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í upprunaliga málinum um Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Nólsoy (22/04934) og síggjast í skjalinum *Ásetingar Nólsoy – Áðrenn og eftir broyting.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Upplýsingar frá umsitingini**
Uppskot um nýggja byggisamtykt fyri Nólsoy varð samtykt í býráðnum 30. mai 2024 og fór til almenna hoyring millum 18. september og 30. oktober 2024,.

Tá ið hoyringsfreistin var farin hevði kommunan móttikið eina viðmerking.

***Viðmerking frá borgara:***
Borgarin vísir á eina ætlan frá 2019, tá ið uppskot um at byggja trý hús fingu noktandi byggiloyvi, vegna ov lítla grundstykkjavídd, sum sambært uppskotinum var 285m$^2$ fyri hvørt húsið.
Vísir verður á, at uppskotið lækkar markið fyri minstu grundstykkjavídd í bústaðarøkinum (A) úr 400m$^2$ og niður í 300m$^2$, og at um hendan byggisamtyktarbroytingin varð framd fyrr, høvdu fleiri hús verið bygd í Nólsoy.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
Býarskipanarliga hevur siðvenja verið at mæla til eina minstuvídd á 500 m$^2$ í bústaðarøkjum. Eitt minstamark á 500m$^2$, saman við byggi- og nýtlustigi á ávíkavist 0,3 og 0,6 tryggjar ein í Føroyum væl kendan sethúsadám, har pláss er fyri bæði urtagarði og meira enn einum bili inni á hvørjum matrikli. Tó er sera ivasamt um hesin leisturin er skilabest í Nólsoy.

Somuleiðis er at viðmerkja, at grundstykkjavíddirnar seinastu árini eru minkandi, serliga grundað á at tryggja meiri burðadygga nýtslu av lendinum. Umsitingin metir at tílíkar verkætlanir, eins og nevnda ætlanin frá 2019, har lutfalsliga smáir bústaðir standa á lutfalsliga smáum grundstykkjum, hóskar væl til umstøðurnar og bygdadámin í Nólsoy.

Í gomlu bygdini eru umleið 56 matriklar lýstir til sethús og til grundstykkir, har ið grundstykkjavíddin er millum 300m$^2$ og heilt niður í 42m2. Hesir matriklar fevna tískil um ein týðandi part av bygdini, við tilsamans 126 skrásettum bústøðum.

Sambært akstovuni eru 60 privatbilar skrásettir í Nólsoy, svarandi til 0,27 privatbilar per íbúgva. Hetta er munandi færri enn miðaltalið í Føroyum, sum er 0,5 privatbilar per íbúgva. Stóri munurin kemst av, at í Nólsoy er beinleiðis ferjusamband til miðbýin, og metir umsitingin at umstøðurnar tískil tala fyri einum munandi minni parkeringstørvi. Somuleiðis er kjarnin í bygdini sermerktur við tættari bygging.

Mælt verður til at lækka ásetingarnar fyri minstu grundstykkjavídd í øki A í byggisamtyktini fyri Nólsoy, frá 300m$^2$ og niður í 250m$^2$. Sostatt er møguleiki fyri at tætti bygdadámurin kann spjaða seg útum gomlu bygdakjarnuna í framtíðini, um umstøðurnar tala fyri tí.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243.
- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri Nólsoy,* journal nr. 22/04934.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

-

**Skjøl**

- *Nólsoy Kort – áðrenn broyting,* journal nr. 25/01097-3
- *Nólsoy Kort – eftir broyting,* journal nr. 25/01097-3
- *Almenna byggisamtyktin - Nólsoy,* journal nr. 25/01097-3
- *Ásetingar Nólsoy – Áðrenn og eftir broyting,* journal nr. 25/01097-3
- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Nólsoy,* journal nr. 22/04934-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta uppskotið um nýggja byggisamtykt fyri Nólsoy, soleiðis at ásetingar fyri minstu grundstykkjavídd í øki A lækka frá 300m$^2$ og til 250m$^2$, og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. januar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Einmælt samtykt.

# 42/25 Skeltisreglugerð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.01.2025 | 9/25 | 25/01099-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 42/25 | 25/01099-1 |

**Samanumtøka av málinum**
Hetta málið er eitt framhald av uppskotinum um nýggja skeltisreglugerð (sí skjal Skeltisreglugerð journal nr 22/02144-1). Endamálið er at skipa viðurskiftir fyri vinnu og borgarar í Tórshavnar kommunu, soleiðis at tað verður greitt hvar og hvussu skelting skal skipast, soleiðis at skelti ikki eru til ampa fyri nærumhvørvi. Nýggja skeltisreglugerðin (sí skjalið Skeltisreglugerð-fyri-tórshavnar-kommunu) er býtt í 5 partar:

1. Endamál við reglugerðini
2. Skeltishættir
   - Í hesum partinum verður skilað ímillum aktiv skeltir og passiv skeltir, ið eru ávikavist elektroniskir skermar og vanlig statisk skeltir úr ymsum tilfari.
3. Endamál við skeltinum
   - Í hesum partinum, verða tey trý skeltissløgini, sum Tórshavnar kommuna loyvir, lýst. Hetta eru: 1) Vinnu- og stovnsskelting, 2) tænastuskelti og kunnungarskelti og 3) lýsingarskelti.
4. Meginreglur fyri snið, uppsetan og staðseting
5. Óbygt øki – 4. grundumráði
   - Í hesum partinum verður undirstrikað, at skelting í 4. grundumráði vanliga ikki er loyvd.

Fyri at gera reglugerðina bindandi og fyri at Tórshavnar kommuna skal kunna handhevja innihaldið, eru ásetingarnar um skelting rótfestar í almennu byggisamtyktini, ið síðani vísir til sjálva skeltisreglugerðina. Uppskotið snýr seg tískil eisini um at broyta almennu byggisamtyktina, soleiðis at nýggjar ásetingar vera galdandi fyri viðkomandi umráðispartar, sum nágreina hvar skelting er loyvt og hvørjar treytir eru galdandi. Uppskotið um broytingar av almennu byggisamtyktini eru markeraðar við grønari skrift í skjalinum *broytingar-í-almennu-byggisamtyktini-oktober-2024-ísv-skeltisreglugerð*

Eitt talgilt kort, ið er at finna á heimaíðuni hjá Tórshavnar kommunu, verður somuleiðis knýtt til reglugerðina, soleiðis at borgarar og umsøkjarar á ein smidligan hátt kunnu síggja hvørjar ásetingar eru galdandi á teimum einstøku økjunum í kommununi (dømi um hetta kortið er at síggja í skjalinum *Kort).*

Skeltisreglugerðin er galdandi frá tí hon verður samtykt og frameftir.

**Lýsing av málinum**
Upprunaliga uppskotið varð viðgjørt í viðkomandi nevndum og samtykt í býráðnum 27. oktober 2022. Uppskotið lá til almenna hoyring millum 7. september 2023 til 19. oktober 2023, og móttók kommunan 10 hoyringarskriv (Sí skjalið *Skeltisreglugerð, journal nr 22/02144-1*).

Umsitingin gjørdi eitt dagført uppskot, (sí skjal *Skeltisreglugerð-fyri-tórshavnar-kommunu)*, ið varð samtykt í býráðnum 19. september 2024. Uppskotið lá til almenna hoyring millum 28. oktober og 9. desember 2024. Tá seinna hoyringstíðarskeiðið varð farið, hevði kommunan móttikið tvær viðmerkingar.

**1. Hoyringarskriv frá borgara** *(sí skjal VS_Skeltisreglugerð fyri Tórshavnar kommunu)*
*Samanumtøka av viðmerking:*

Víst verður á ampar frá ljósskíggjanum hjá Wenzel (Stiðjagøta 3), fyrrverandi Bilrøkt, umframt ljósskíggjanum á Sandavágs timburhandli (Smiðjugerði 6). Skotið verður upp, at øll (bæði verandi og

komandi) aktiv talgild skeltir og ljósskeltir, sum venda inn ímóti bústaðarøkjum skulu vera sløkt frá kl 20:00 til kl 8:00 um morgunin

*Svar frá umsitingini:*
Í upprunaliga uppskotinum var ætlanin, at seta krav um, at ljósskíggjar skuldu sløkkjast millum kl 22-06, men eftir fyrru viðgerðina varð hendan orðingin tikin burtur, tí skeltiseigarar vístu á, at tað var ynskiligt at skeltini vóru tendaði alt døgnið, men at ljósstyrkin verður dempað í mun til dag og nátt og verður stillað eftir kringumstøðunum.
Skeltireglugerðin verður galdandi frá tí degi hon er samtykt í Umhvørvismálaráðnum, og fær reglugerðin sostatt ikki kravt at skermar verða tiknir niður. Verandi skermar og skelti, fáa loyvið at verða verðandi, tó skulu nýggju treytirnar lúkast, og víst verður til fylgiskjal í skeltisreglugerðini, sum vegleiðir, hvussu ljósstyrkin skal mátast.

**2. Hoyringarkriv frá borgara** *(sí skjal Tórshavnar komm des 2024)*
*Samanumtøka av viðmerking:*
Í skrivinum verður staðseting av ljósreklamuskýggja á eystara enda á Mannbrekku 1 mótmælt. Heitt verður á, at taka skíggjan burtur, vegna hesi viðurskiftir:

- Ljósið frá skíggjanum er ov sterkt og órógvar náttarsvøvnin
- Ljósið lýsir sum ein projektørur inn í hús bæði dag og nátt
- Ljósið darvar eisini, tá ið gingið verður í økinum
- Ljósið órógvar bilaferðsluna og er tískil vandamikil fyri gongufólk / skúlabørn
- Ljósið elvir til, at tað ikki longur ber til at síggja norðlýsið
- Skíggin økir Co2 útlát í mun til el- og tilfarsnýtslu

*Svar frá umsitingini:*
Umsitingin ásannar at punktini omanfyri eru týdningarmikil orsøk til tørvin á skeltisreglugerðini. Sambært uppskotinum verður tað framyvir bert loyvt at seta upp passiva skelting í bústaðarøkinum við Mannbrekku 1. Viðv. at krevja skeltið niður í hesum økinum, so verður víst til viðm. hjá umsitingini til hoyringarskriv nr. 1 omanfyri.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Almenna byggisamtyktin.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- 22/02144 Skeltisreglugerð

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Skeltisreglugerð,* journal nr 22/02144-1
- *Skeltisreglugerð-fyri-tórshavnar-kommunu,* journal nr 25/01099-4
- broytingar-í-almennu-byggisamtyktini-oktober-2024-ísv-skeltisreglugerð, journal nr 25/01099-4
- *VS_Skeltisreglugerð fyri Tórshavnar kommunu,* journal nr.25/01099-3
- *Tórshavnar komm des, journal nr. 2024* 25/01099-2
- Kort, journal nr *journal nr.* 25/01099-5

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til, at halda fast í dagførdu skeltisreglugerðini, samtykt í býráðnum 19. septembur 2024 og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. januar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Einmælt samtykt.

# 43/25 Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.01.2025 | 11/25 | 25/01683-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 14.01.2025 | 7/25 | 25/01683-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 43/25 | 25/01683-1 |

**Upprunin til málið**
Málið er lýst í fylgiskjali *Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum jnr. 25/01683-2*.

**Ískoyti**
Víst verður til samtykt hjá undanfarnu byggi- og býarskipanarnevnd hin 11. desember 2024, har tað varð samtykt í máli nr. 23/05639, Nýggj serstøk byggisamtykt fyri røktarheim á Stórubrekku, matr. nr. 138a, Hoyvík, at gera eina umhvørvisárinsmeting, áðrenn nakað arbeiði fer í gongd.

**Søgulig gongd**
Grundøkið, er partur av einum størri øki í býarpartinum 'Hoyvíkshagi suður'", sum varð lagdur til rættis mitt í 80´árunum. Økið hevur so statt í mong ár verið ætlað til byggilendi. Søguliga hevur byggisamtyktin fyri økið verið hendan:

- 1982: Byggisamtyktarkort av Hoyvík, vísir alt økið við Stórubrekku sum A1, ætlað sethúsum.
- 1996: Økið er broytt til A3, sum fevnir um blandaða bústaðar- og miðstaðarbygging.
- 2020: Partur av Dalinum Langa verður broyttur frá A3 til D1, sum verður lagt til almenning, náttúrufriðingar- og mentanarlig endamál (j.nr. 18/04229).
- 2022: Økið á Stórubrekku verður broytt frá A3 til D3, sum fevnir um stórar almennar stovnar fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt (j.nr. 22/00349).
- 2024: Serstøk byggisamtykt fyri Stórubrekku verður galdandi fyri D3 økið (j.nr 23/05639). Serstaka byggisamtyktin lýsir nágreiniliga, hvat er loyvt at byggja á lendinum. Tekningar, so sum støðuplanur, skurðar og visualiseringar vísa ætlaðu bygginginа.

**Kanning og vernd av økinum**
Økið, har røktarheimið er staðsett, er í fleiri umførum kannað. Eitt nú hevur Jarðfeingi gjørt eina frágreiðing til Tórshavnar kommunu um "Nøkur fyribrigdi í landslagnum á Stórubrekku í Hoyvík". Sí skjal, j.nr.25/01683-4

Somuleiðis hevur Býarskipanardeildin í byggiskránni til nýggja røktarheimið lagt stóran dent á at varðveita upprunalendið kring bygginginа. Viðfest er brot úr byggiskránni, sum fevnir um lýsing av "býarskipan og grundøki". Sí skjal, j.nr.25/01683-3

Í útbjóðingartilfarinum verður álagt arbeiðstakaranum, ið skal byggja røktarheimið, at varðveita upprunalendi í størst møguligan mun, m.a. við at endurnýta partar av flagnum, sum verður grivið av. Viðfest er brot úr arbeiðsfrágreiðingini hjá lendisarkitektinum. Sí skjal, j.nr. 25/01683-11.

**Status í verkætlanini:**
Byggiloyvi varð útskrivað í juni, høvuðsprosjektið er bjóðað út, og lisitatiónin verður 31. januar 2025. Tá ið sáttmáli er gjørdur við vinnandi arbeiðstakaran, er so statt klárt at fara undir at byggja røktarheimið á Stórubrekku.

Vísandi til omanfyristandandi metir umsitingin, at tilgongdin í sambandi við ætlaðu bygginginа á Stórubrekku hevur fylgt øllum teimum mannagongdum og krøvum, sum verða sett til slíkar byggingar, herundir kanningar, sum eru gjørdar av landslagnum í økinum, jarðfrøðiligar kanningar, boriroyndir og annað.

Tað er ein sannroynd, at alsamt størri sjóneyka verður sett á ávirkanina, sum býarmenning og bygging hevur á náttúruna, umhvørvið og nærumhvørvið. Einki krav er um, at árinsmetingar skulu gerast í sambandi við vanliga bygging. Formell krøv finnast bert í mun til verkætlanir innan el-framleiðslu – í sambandi við uppsetan av vindmyllum – og í sambandi við verkætlanir á sjónum, og tá ið sjóøki verður fylt upp.

Spurningurin um, í hvønn mun og hvussu árinsmetingar eiga at verða gjørdar, eigur tó at verða viðgjørdur, hvørja ferð kommunan fer í gongd við at inndraga nýtt byggilendi og í gongd við størri byggingar og útstykkingar, og mælt verður tí til, at mannagongdir verða gjørdar hesum viðvíkjandi.

Hetta er eitt arbeiði, sum er málsøki hjá náttúru- og umhvørvisnevndini, og mælt verður tí til, at málið verður reist har.

Umsitingin mælir tí til, at umhvørvisdeildin hjá Tórshavnar kommunu fer undir at gera mannagongdir fyri umhvørvisárinsmetingar í sambandi við býarmenning og bygging í kommununi.

**Skjøl**
25/01683-2 Upprunaliga málslýsingin: Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum (jnr. 17/03196)
25/01683-3 Byggiskrá
25/01683-4 Nøkur fyribrigdi í landslagnum á Stórubrekku í Hoyvík
25/01683-11 K02_C08.2_N01 Arbeiðs- og bygningslutafrágreiðingar, lendisarbeiði LARK 28-30

**Tilmæli**
Heilsu- og umsorganarstjórin, miðfyrisitingarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:
- At nevndin tekur omanfyristandandi málsgongd til eftirtektar, har staðfest verður, at nøktandi kanningar eru gjørdar av økinum, og at neyðugt tí ikki er við fleiri kanningum í ítøkiliga málinum, og harumframt at umsitingin fer undir eina tilgongd at gera mannagongdir fyri umhvørvisárinsmetingar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. januar 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen og Heidi Lava Elgeirsdóttir, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Kári Johansen og Birgir Nielsen, krevur málið fyri býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 14. januar 2025:** Málið umrøtt.

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen løgdu fram broytingaruppskot um at gera umhvørvisárinsmeting í økinum, áðrenn arbeiðið at byggja røktarheim í Stórubrekku fer í gongd.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við fimm atkvøðum fyri, sjey atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen og Kristianna Winther Poulsen.

Blankt atkvøddi: Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og tveimum blankum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen.

| | Býráðsfundur<br>30. januar 2025 | Blað nr.: 101 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

## 44/25 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2024 - 24/00061

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.01.2025 | 10/25 | 25/00292-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 44/25 | 25/00292-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri november verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2024:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 12. desember 2024:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2025:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. januar 2025 | Blað nr.: 103 |
| | Formansins merki: |

# 45/25 Skeið í Íslandi februar 2025 fyri býráðslimum valskeiðið 2025-2029

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.01.2025 | 16/25 | 25/02303-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 45/25 | 25/02303-1 |

**Upprunin til málið**
Kommunufelagið skipar fyri skeiði í íslandi fyri nývaldar og afturvaldar kommunustýrislimir.

**Lýsing av málinum**
Endamálið er at styrkja kommunustýrislimirnar í leikluti teirra sum kommunupolitikkarar og at geva teimum førleika og vitan um tær uppgávur og avbjóðingar, ið kommunurnar hava nú og framyvir.

Harumframt at viðgera grundleggjandi reglur um rættindi og skyldur hjá einstaka politikkaranum, eins og løgfrøðiligar ásetingar um samanspælið millum politikkarar og fyrisiting.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Ferðin krevur góðkenning frá fíggjarnevndini og býráðnum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2025:** Samtykt at góðkenna ferðina og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og trimum blankum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Bergur Robert Dam Jensen og Birgir Nielsen.

**FUNDURIN LOKIN KL. 19:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Elsa Berg | Heðin Mortensen | Heidi Lava Elgeirsdóttir |
| Annita á Fríðriksmørk | Anja Weyhe | Kristianna Winther Poulsen |
| Bergur Robert Dam Jensen | Guttormur í Skála | Annfinn Brekkstein |
| Tróndur Sigurðsson | Kári Johansen | Høgni Vilhelmsen |
| | Birgir Nielsen | |